VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Fleyr til gul av norði ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.



Veðrið leygardagin:
Gul til stívt andøvsgul av eystri, seinnapartin upp í hvassan vind. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 11 og 14 stig.



Veðrið sunnudagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av eystri og landnyrðingi og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 11 og 14 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og eystri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 12 og 16 stig.

Átta áttanda í áttanda í átta

FØÐINGARDAGUR

Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

Fyri mong ljóðar hendan yvirskriftin helst sum tað reina volapykk, men sonn er hon. Í dag fyllir Jákup Skaaning Dahl, sonur Signe Skaaning og Jens Paula Dahl í Leynum, átta ár. Og tá dagurin er áttandi í áttanda í 2008, ja so er væl í lagi at skriva soleiðis.

Jákup Skaaning Dahl fyllir sama dag sum abbi sín, ið verður 63 ár í dag. Tillukku tit báðir. Sama dag varð Róar føddur, sum er sonur Eydnu Mørkøre og Una Leitistein Hansen, ið nú búgva í Keypmannahavn. Eisini ein genta úr Hvalba varð fødd hendan dagin, sum vit tíverri ikki hava navnið á. Eisini tillukku til tey bæði.

Í brævinum til Sosialin skrivar Jákup Skaaning Dahl, at hann fer í annan flokk í Kvívíkar skúla eftir summarfrítíðina, og at hann er næstelst av fýra systkjum.

Hann elskar at svimja, vera hjá skótum og rokast úti.

- Beint nú eri eg í summarfrí hjá pápa mínum saman við stórabeiggja Jóhann, og vit eru í Trongisvági og ferðast. Føðingardagin fari eg at halda við lekkrum mati, kanska ein túr at bowla, og so fari eg at bjóða flokkinum í føðingardag, tá ið skúlin byrðjar aftur, sigur Jákup Skaaning Dahl úr Leynum.

Víðari skrivar hann:

- Havi tað so gott, og tillukku til øll hini, sum hava tann sama sjáldsama føðingardagin sum eg.

Saman við eini gentu úr Hvalba hava halda hesir báðir føðingardag hendan sjáldsama dagin, 08.08.08. Frá vinstru Jákup Skaaning Dahl, sum býr í Leynum, og Róar Mørkøre, ið býr í Keypmannahavn

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	7
Nuuk	10
Qaqortoq	16
Ammassalik	11
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	12
Seyðisfjørður	10
Tórshavn	11
Lerwick	15
Aberdeen	16
London	18
Tromsø	--
Bergen	15
Oslo	--
Stokkhólm	22
Keypmannah.	23
Helsinki	13
Moskva	16
Berlin	23
Warzawa	24
Kiev	25
Bukarest	29
Paris	23
Madrid	34
Róm	29
Malorca	29
Athen	31
Malta	32
Tunis	32
Beijing	32
New Dehli	31
Bangkok	31
Jakarta	30
Sydney	15
New York	27
Miami	29
Los Angeles	22
Meksikobýur	--
Panama	29
La Paz	12
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	10

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt hátrýst, 1020 hPa. sunnan fyri Ísland fer spakuliga í landnyrðing og viknar.



Í dag:
Hátrýstið í útsynning vestan úr Føroyum viknar framvegis. Lágtrýstið í landsynning úr Hvarvinum stendur mestsum í stað og brúgvalgið haðani verður væntandi yvir Føroyum um vikuskifti

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 03/08 kl. 06⁰⁰ – 04/08 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,2°
Minsti hiti máldur í august: 0,4° - Mesti hiti máldur í august: 20,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 03/08 kl. 06⁰⁰ – 04/08 06⁰⁰.
Avfallið higartil í august: 2 mm

VESTFALLSKYRRINDI

30. august	Mánin næstur jørðini
1. august	Tendring
8. august	Fyrra kvarter
10. august	Mánin longst frá jørðini

Kelda: Ársmanakkin 2008

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmanna-sundi fp.	Vestmanna-sundi sp.	Mykines-firði fp.	Mykines-firði sp.	Nólsoyar-firði fp.	Nólsoyar-firði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvanna-sundi fp.	Hvanna-sundi sp.	Fugloyar-firði fp.	Fugloyar-firði sp.
7. aug.	11:49	-	10:49	23:10	11:04	23:25	1:28	13:49	2:28	14:49	10:04	22:25	9:04	21:25	-	12:04	0:43	13:04	11:34	23:55	0:28	12:49
8. aug.	0:10	12:46	11:46	-	-	12:01	2:10	14:46	3:10	15:46	11:01	23:37	10:01	22:37	0:25	13:01	1:25	14:01	-	12:31	1:10	13:46
9. aug.	1:22	13:59	0:22	12:59	0:37	13:14	3:22	15:59	4:22	16:59	-	12:14	11:14	23:51	1:37	14:14	2:37	15:14	1:07	13:44	2:22	14:59
10. aug.	2:36	14:59	1:36	13:59	1:51	14:14	4:36	16:59	5:36	17:59	0:51	13:14	-	12:14	2:51	15:14	3:51	16:14	2:21	14:44	3:36	15:59
11. aug.	3:23	15:45	2:23	14:45	2:38	15:00	5:23	17:45	6:23	18:45	1:38	14:00	0:38	13:00	3:38	16:00	4:38	17:00	3:08	15:30	4:23	16:45

Lesið
Sosialin